# Vilja útbyggja skúlan í Hoydølum

**Tríggir tingmenn leggja nú fram eitt uppskot, har teir mæla til, at studentaskúlin í Hoydølum verður út- og umbygdur**

STUDENTASKÚLI
*Magnus Dam*

Ætlanin um at byggja ein nýggjan studentaskúla í Havn er løgd í skuffuna í nøkur ár afturat. Landsstýrið ætlar ikki at fara undir bygginging fyrrenn í fyrsta lagi í 2003.

Hetta hevur fingið nakrar tingmenn at taka spurningin upp til viðgerðar í Løgtinginum. Teir fara á tingfundinum í dag at leggja fram uppskot um at loyva landsstýrismanninum at byggja nýggjan skúla í Hoydølum, eins og ætlanin upprunaliga var, tá ið ein arkitektakapping varð útskrivað um nýggjan studentaskúla í 1996.

Hendan ætlanin er síðani kolldømd, tí umstøðurnar skulu ikki vera nóg góðar í Hoydølum. Ætlanin er tí at byggja nýggjan studentaskúla við Marknagilsvegin í staðin. Men hóast tørvur er á nýggjum skúla, so verður eingin bygging tey fyrstu árini.

## Vilja skunda undir

Hetta halda Jákup Sverri Kass, Kristian Magnussen og Jenis av Rana ikki vera nakað gott hugskot. Teir vilja tí við sínum uppskoti skunda undir at byggja nýggjan studentaskúla. Teir skjóta upp, at Løgtingið samtykkir at geva landstýrinum heimild til at byggja nýggjan studentaskúla. Og nýggi skúlin skal ikki vera við Marknagilsvegin, men í Hoydølum.

Teir halda ikki, at grundgevingarnar fyri at sleppa ætlanini frá 1996 eru nóg góðar, og teir halda harafturat, at tað verður bíligari at umbyggja skúlan í Hoydølum og byggja uppí enn at byggja nýtt við Marknagilsvegin.

– Óvissan um framtíðarstøðuna hjá skúlanum hevur nú varað nóg leingi. Óvissan hevur havt við sær, at skúlin hevur manglað fígging til viðlíkahald í nógv ár, og skilið er hareftir. Tískil mæla vit til at rudda óvissuna um framtíðarstøðu skúlans burtur, siga tingmenninir í viðmerkingunum til uppskotið.

Teir mæla til, at lógin um ávísar skúlar verður broytt, so tað kemur at standa í lógini, at nýggi skúlin skal liggja í Hoydølum, og í viðmerkingunum siga teir, at støðið skal takast í ætlanunum, sum vóru frammi í samband við arkitektakappingina.

– Vit tosa í hesum føri um ein skúla, sum skal kunna lúka tey endamál og tær treytir, sum vit í einum framkomnum samfelag eiga at kunna bjóða næmingum og lærarum, siga teir tríggir tingmenninir.


*Tríggir tingmenn mæla til, at tað verður lógarfest, at nýggjur studentaskúli skal byggjast í Hoydølum. Ætlanin hevur annars verið at byggja nýggjan skúla við Marknagilsvegin.*

# Broytt trivnaðarráð

**Uppskotið um at seta eitt Trivnaðar- og heilsuráð at endurskoða almanna- og heilsuverkið verður helst samtykt í løgtinginum í dag. Andstøðan heldur, at pengarnir eru burturspiltir**

TRIVNAÐARRÁÐ
*Magnus Dam*

Trivnaðar- og heilsuráðið kann síggja fram til eitt sera umfatandi og uttan iva drúgvt arbeiði. Ráðið skal finna útav, hvussu føroyska almanna- og helsuverkið skal skipast í framtíðini, og hvussu vit tryggja, at støðið er nóg høgt.

Løgtingið samtykti við aðru viðgerð hósdagin uppskotið um nýggja ráðið, og í dag er triðja viðgerð av málinum.

Løgtingið samtykti hósdagin eitt broytingaruppskot frá meirilutanum í trivnaðarnevndini, sum inniber, at uppgávurnar hjá ráðnum verða nakað broyttar í mun til upprunaligu ætlanina.

Trivnaðarnevndin helt millum annað, at uppgávurnar fara at verða so umfatandi, at neyðugt verður við einum skrivara fulla tíð, sum skal samskipa arbeiðið. Hesa mannagongdina brúkti kommununevndin, og Grundlógarnevndin hevur somuleiðis ein skrivara í starvi fulla tíð.

## Broyttu arbeiðssetningin

Meirilutin í trivnaðarnevndini helt harafturat, at uppgávurnar, sum ætlanin var at áleggja nevndini, ikki eru nóg greitt lýstar. Nevndin mælir tí til eitt øðrvísi býti enn Almanna- og heilsumálastýrið. Sambært álitinum frá meirilutanum skal nevndin leggja dent á fimm spurningar.

Fyrsti spurningurin, sum greiði skal fáast á, er, hvussu almanna- og heilsuverkið kann virka meira fyri fyribyrging enn tað ger í dag. Ein spurningur snýr seg um klientgering, og hvussu vit fyribyrgja, at fólk verða »hangandi« í almannaverkinum. Ein spurningur snýr seg um fíggingina, og hvussu vit tryggja, at samfelagið fær sum mest burtur úr pengunum, sum verða játtaðir til almanna- og heilsuøkið. Ráðið skal eisini finna útav, hvussu almanna- og heilsuverkið kann samskipast soleiðis, at tænasturnar verður skipaðar eftir tørvinum hjá borgarunum, heldur enn eftir tørvinum hjá almanna- og heilsuverkinum. Og harafturat skal Trivnaðar- og heilsuráðið kanna, hvussu vit skipa heilsuverkið eftir føroyskum leisti og ikki bert eftir innfluttum fyriskipanum.

## Burturspilt

Minnilutin í nevndini, umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, halda hinvegin ikki, at tað er eitt gott hugskot at seta Trivnaðar- og heilsuráðið, sum væntandi fer at kosta umleið tvær milliónir krónur. Teir halda ikki, at uppskotsstillararnir hava eina realistiska fatan av, hvussu almanna- og heilsuverkið er fyriskipað, og hvørji krøv verða sett hesum verkum dagliga.

– Landsstýrið hevur í trý ár hildið uppá, at tað skuldi koma við einum sonevndum »idé-katalogi« við tí endamáli at gera alla landsumsitinigina einfaldari, ódýrari, effektivari og í øllum viðurskiftum skipa eftir einum føroyskum leisti. Men enn hevur eingin "idé" hesum viðvíkjandi sæg dagsins ljós, tvørturímóti hevur gongdin verið tann øvugta, sigur minnilutin í sínum viðmerkingum til uppskotið.

– Tá ið politiski myndugleikin sjálvur sostatt ikki megnar hesa uppgávu, verður hvaðna verri hjá einum ráði uttan nakað politiskt mandat og uttan, at nakar arbeiðssetningur yvirhøvur er við í lógaruppskotinum, leggur minnilutin afturat.

Minnilutin heldur ikki, at ráðið fer at koma við nøkrum uppskotum um sparingar, og at pengarnir høvdu verið betri nýttir til aðrar neyðugar játtanir.

17 tingmenn, samgonguflokkarnir saman við Miðflokkinum, atkvøddu fyri uppskotinum við aðru viðgerð, meðan 11 tingmen úr Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum atkvøddu ímóti uppskotinum. Á tingfundinum í dag skal uppskotið so til triðju og seinastu viðgerð.

# Ein millión til økisterapi

**Almanna- og heilsumálastýrið ætlar at brúka eina millión krónur í ár til eina royndarskipan við økisterapi til fólk við rørslubreki. Samstundis skal tørvurin á viðgerð lýsast**

ØKISTERAPI
*Magnus Dam*

Í staðin fyri at brúka nógvan pening uppá at senda fólk av landinum til uppvenjingar, skulu rørslutarnað fáa fleiri tilboð um venjing og uppvenjing í Føroyum.

Hetta kemur fram í einum svari frá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu, uppá fyrispurning frá Rúnu Sivertsen um venjingartilboð til rørslutarnað.

Rúna Sivertsen vildi hava at vita, um nøkur ætlan er um at gera eina skipan, sum tryggjar teimum rørslutarnaðu neyðuga vegleiðing og venjing í Føroyum. Møguleikarnir í Føroyum í dag eru ikki góðir, og stórur tørvur er á betri tilboðum. Betri venjingartilboð høvdu eisini minkað um tørvin á stuðulsfólki, koyristólum og skurðviðgerðum, vísti Rúna Sivertsen á í sínum viðmerkingum.

Í dag verða nógv fólk send av landinum til uppvenjingar, tí tey ikki kunnu fáa hesa viðgerðinga heima í Føroyum. Hetta kostar nógvan pening, og hesin peningurin hevði verið betri nýttur í Føroyum, heldur tingkvinnan hjá Fólkaflokkinum.

## Royndarskipan við økisterapi

Eftir svarinum at døma, er ein glotti at hóma hjá hesum fólkunum. Ein millión krónur eru settar av á fíggjarlógini til eina royndarskipan við økisterapi, og ætlanin er at seta hesa skipanina í verk um stutta tíð. Ætlanin er, at økisterapi skal vera á tveimum støðum í landinum, men enn er ikki greitt, hvar hetta verður. Fólk, sum ikki hava tørv á tungari og truplari viðgerð kunnu so fáa regluliga venjing úti í økisterapiini.

Tann meira intensiva viðgerðin skal framvegis fara fram á sjúkrahúsunum og í nøkrum førum uttan fyri landoddarnar, har góð tilboð eru.

Ein arbeiðsbólkur er eisini settur at lýsa tørvin á viðgerð, eftirviðgerð og venjing í Føroyum, og hann verður væntandi liðugur við sítt arbeiði hesa vikuna. Hesin arbeiðsbólkurin hevur mælt til at gera eina royndarskipan við økisterapi í tveimum støðum í Føroyum og at arbeiða við at gera eina meira samskipaða intensiva viðgerð eftirfylgjandi.

Arbeiðsbólkurin skal lýsa, hvussu nógvir føroyingar hava eitt ella annað rørslubrek í dag og meta um, hvussu stórt talið verður um nøkur ár, og hvussu aldursbýtið verður. Bólkurin skal lýsa, hvussu vit í Føroyum nøkta tørvin á viðgerð á besta og mest skynsama hátt, og hann skal somuleiðis lýsa, hvussu almanna-, heilsu- og skúlaverkið kunnu samstarva um at loysa tørvin. Í hesum sambandi skal havast í huga, at fíggjarliga orkan er avmarkað.

Helena Dam á Neystabø sigur í svarinum, at tað er rætt, at samskipaði tilboð í Føroyum til øll rørslutarnað kundu spart tí almenna pening. Men hetta hendir ikki eftir einum degi.

– Tað er neyðugt at brúka orku til at seta dyggar skipanir á stovn, og tað skerst ikki burtur, at sparingarnar koma ikki innan eitt stutt áramál. Tær koma í einum longri tíðarhøpi, vísir hon á.



Jákup Mørkøre móti Helenu:

# Dómur fellur í februar

**Viðgerðin var drúgv, tá stevningin hjá Jákupi Mørkøre móti Helenu Dam á Neystabø um ærumeiðing var fyri í Føroya Rætti fríggjadagin. Báðir partarnir eru grundleggjandi ósamdir um skyldurnar hjá einum embætismanni. Dómarin skal hugsa seg um til 13. februar áðrenn dómur fellur**

RÆTTARMÁL
*John Johannessen*


*13. februar fellur avgerðin í sakarmálinum millum Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðara, og Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hevur Jákup Mørkøre í sínum starvi verið illoyalur og ólýðin móti politisku skipanini í sínum starvi sum sjúkrahúsleiðari, ella hevur hann bert røkt sína skyldu?

Hetta er spurningurin, sum Jørgen B. Petersen, dómari, skal taka støðu til innan 13. februar, tá hann skal fella dóm í rættarmálinum millum fyrrverandi sjúkrahúsleiðaran og landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum.

Jákup Mørkøre hevur stevnt Helenu Dam á Neystabø fyri ærumeiðing í sambandi við, at hon segði honum úr starvi sum sjúkrahúsleiðari við teimum grundgevingum, at hann var ólýðin og illoyalur, eftir at hann í Sjónvarpinum hevði boðað frá, at sparingar á fíggjarlógini fóru at hava við sær hópuppsagnir á Landssjúkrahúsinum.

## Skyldur og fræsli

Trætan millum Helenu Dam á Neystabø og Jákup Mørkøre snýr seg í stuttum um, hvøjar skyldur og hvussu stórt fælsi ein almennur sjúkrahúsleiðari hevur sum embætismaður.

Helna Dam á Neystabø heldur, at Jákup Mørkøre hevur verið ólýðin móti henni, sum politiskum myndugleika, tá hann í miðlunum hevur gjørt viðmerkingar til játtanina á fíggjarlógini til Landssjúkrahúsið.

Fyrstu ferð, Helena Dam á Neystabø heldur Jákup Mørkøre hava verið illoylan móti sær, var, tá hann í Dimmalætting í august 1998 segði, at Landssjúkrahúsið hevði fingið 15 milliónir krónur ov lítið játtaðar til rakstur á fíggjarlógini. Aðru ferð var, tá Jákup Mørkøre í oktober 1999 í Sjónvarpinum boðaði frá, at sparingar á Landssjúkrahúsinum fóru at hava við sær hópuppsagnir.

Men Jákup Mørkøre heldur ikki, at hann hevur verið ólýðin móti politisku skipanini. Hann vísir á, at hann allatíðina hevur hildið sínar skyldur. Útmeldingarnar um, at sparingar fóru at føra til uppsagnir vóru eftir hansara tykki alt annað enn illoyalar. Eftir hansara fatan, gjørdi hann ikki annað, enn at kunna um tær fylgjur, sum tað fekk fyri Landssjúkrahúsið, at hann helt seg innan fyri játtanina.

Fyri at próvføra grundgevingarnar, fóru báðir partar niður í smálutir í samskiftinum á Landssjúkrahúsinum og í Almanna- og Heilsustýrinum ta tíðina, Jákup Mørkøre sat sum sjúkrahúsleiðari. Í hesum samandi vóru eisini fleiri embætisfólk kallað inn sum vitni. Advokatarnir hjá báðum pørtum royndu at fiska eftir øllum hugsandi smálutum, og tað kom fleiri ferðir fyri, at dómarin heitti á advokatarnir, um at halda seg til tað, sum hevði týdning í málinum.

## Politikarin hevur valdið

Undir proseduruni, sum var eftir náttura fríggjakvøðið, royndi Bjørn á Heygum, advokatur hjá Jákupi Mørkøre, at sannføra dómaran um, at Jákup Mørkøre hevði frælsi at úttala seg, og at hann aldri hevði tikið nakra avgerð, ið var illoyal móti landsstýrismanninum. Tí helt Bjørn á Heygum, at tað var rætt at døma Helenu Dam á Neystabø fyri ærumeiðing. Ein uppsøgn, har Jákup Mørkøre var skýrdur at vera illoyalur, var nevniliga ógvuliga tyngjandi fyri Jákup Mørkøre.

Jógvan Páll Lassen, sum var advokatur hjá Helenu Dam á Neystabø, vísti á, at uppsøgnin aldri var send út alment, men at tað var Jákup Mørkøre, sum sjálvur hevði almannakunngjørt hana.

Harafturat vísti Jógvan Páll Lassen á ymsikar løgfrøisligar tulkingar av skyldunum hjá embætismonnum móti politisku skipanini. Hesar tulkingar vístu heilt greitt, at embætismenn hava skyldu at tæna politiska myndugleikanum, og skulu tí ikki koma út við ógvusligum útsagnum, sum kunnu skaða politiska myndugleikan.

Talan er um eitt ógvuliga torskilt mál, og tí ber ikki til at siga, um grundgevingarnar í rættinum fríggjadagin vóru til fyrimuns fyri nakran av pørtunum. Men 13. februar fæst at vita, um Føroya Rættur gevur Jákupi Mørkøre viðhald í ákærunum móti Helenu Dam á Neystabø.

Jákup Mørkøre krevur í fyrsta lagi, at Helena Dam á Neystabø verður dømd fyri ærumeiðing og í øðrum lagi, at hon verður dømd at viðurkenna, at Jákup Mørkøre hvørki hevur verið ólýðin ella illoyalur.

# Tingfundir á internetinum

**Nú ber til hjá øllum, sum hava teldu og internet, at hoyra orðaskiftið á tingi beinleiðis um internetið**

POLITISK UPPLÝSING
*John Johannessen*

Tað hevur í nøkur ár borið til at hoyrt allar tingfundir beinleiðis umvegis sendinetið hjá Sjónvarpinum. Men hetta hevur bert borið til, tá Sjónvarpið annars ikki sendir.

Nú hava tey, sum hava stóran áhuga fyri politikki, fingið ein møguleika afturat at fylgja við tí, sum fyriferst á tingsins røðarapalli. Fyritreytin er tó, at tú hevur teldu og atgongd til internetið. Á heimasíðuni hjá løgtinginum ber nevnliga til at hoyra orðaskiftið beinleiðis í sokallaðum real stream.

Fyri at hoyra orðaskiftið krevst eitt forrit, sum kallast Real Player, og er hetta at fáa ókeypis á internetinum.

Heimasíðan hjá løgtinginum er at finna á www.logting.fo

*Umframt at hoyra tingfundir beinleiðis um sendinetið hjá Sjónvarpinum, ber nú eisini til at hoyra teir á internetinum*




útsølan
÷50%
byrjar hósmorgunin kl. 09.00
VOGUE M. Heinasonargøta 23
Tlf. 312380